# Bobbies eru ímyndin av enskari løgreglu

England swings like a pendulum do,
Bobbies on bicycles, two by two,
Westminster Abbey the tower of Big Ben,
The rosy red cheeks of the little children.

Soleiðis syngur Roger Miller í sanginum »England swings« frá miðskeiðis í 60-unum, og líka so enskt sum reyðu telefonboksirnar eru, líka enskir eru løgreglumenninir, the Bobbies. Tað var Robert Peel, sum í 1829 legði fram uppskotið um at stovna eina professionella løgreglustyrki. Undan Ídnaðarkollveltingini tíðliga í 1800-talinum vóru tað lokalir løgreglumenn kanska hjálptir av sivilum patruljum, sum skuldu loysa kriminellu gáturnar. Men við Ídnaðarkollveltingini tustu folk av landinum inn í býirnar, og fyritøkur stovnaðu ofta sínar egnu løgreglustyrkir fyri at verja síni áhugamál. Kendasta av slagnum var helst the Thames River Police, sum maktfulla West India Trading Company setti á stovn í 1798 fyri at steðga tjóvum framvið atløgubryggjunum í London. Í dag eru hesir somu Bobbies enn til, og tú kanst hitta teir bæði til gongu og á hestbaki. Hetta sienna er praktiskt, tí ofta kann tað verða trupult at koma fram í nógvu ferðsluni, sum er í London, og hartil eru hesir Bobbies á hestbaki uppvandir til crowd control.






















